

www.sansir.fo

# Stilla upp til eldraráðið

Eldraráð skal veljast í Tórshavnar kommunu. Eldraráðið skal geva okkara politikarum góð ráð og syrgja fyri, at atlit altíð verða tikin fyri okkum eldru, tá ið avgerðir verða tiknar.
Ert tú 60 ár ella eldri og býrt í Tórshavnar kommunu, átti tú at umhugsað at stilla upp.
Kundi tú hugsað tær at stilla upp, skalt tú senda kommununi skrivliga fráboðan um tað í seinasta lagi fýra vikur undan valinum. Tað er 1. november 2005 klokkan 16.00.
Saman við fráboðanini skulu undirskriftir fylgja við frá fimm stillarum, sum eisini lúka treytirnar fyri valrætti til Eldraráðið.
Stilla upp… vit hava brúk fyri tær!




Í hesum faldara, sum er sendur í hvørt hús í Tórshavnar kommunu, fært tú nágreiniligar upplýsingar um val til Eldraráðið. Valevnislistar at fylla út fáast í Snarskivuni tel 30 20 10 ella á heimasíðuni www.torshavn.fo, har tú eisini fært meira at vita um valið.

**Tórshavnar Kommuna**